Landssjúkrahúsið



# Tonsillektomi

## Leiðbeining,
## tá mandlur verða tiknar

**(Vaksin og børn)**

## Fyrireiking

Vanligt er at møta sama dag, sum skurðviðgerðin verður gjørd, men kemur tú langvegis frá, er møguleiki fyri at verða innløgd/lagdur dagin fyri.
Snýr tað seg um eitt barn, verður annað av foreldrunum innlagt saman við barninum. Annað av foreldrunum fylgir barninum allan vegin—til tað er sovnað inni á skurðviðgerðarstovuni.
Gongst eftir ætlan, verður tú/barn títt útskrivað/ur dagin eftir skurðviðgerðina.

Kvøldið fyri skurðviðgerðina skal tú/barn títt FASTA frá kl. 24.

## Fyrireikingar á deildini



Tablettir, tilráddar av narkosulækna, verða givnar.
Børn fáa EMLA-plástur (lokaldoyvandi) á handbakið.
Skurðviðgerðin fer fram fyrrapartin.
Undir skurðviðgerðini skal tú/barn títt ikki hava neglalakk á. Heldur ikki hava ringar, hálsprýði ella tílíkt.
Langt hár skal vera bundið upp.

Viðgerðin fer fram í fullari doyving og varar í 1/2-3/4 tíma. Av skurðgongini verður tú koyrd/ur beinleiðis inn í viðrakning, har fólk er um teg, til tú ert heilt vakin og verður koyrd/ur aftur á deildina. (Annað av foreldrunum er við barninum inni í viðrakning).

## Aftaná skurðviðgerðina

Vanligt er at vera útskrivaður dagin eftir skurðviðgerðina, tá oyrnalæknin hevur hugt í hálsin.

## Kostur

Sama dagin fært tú/barn títt bert kalt flótandi. Dagin eftir kanst tú eta vanligan kost, tó ikki skorpur, súreplir ella annað, ið kann ríva í hálsin. Et heldur ikki ov heitan ella kryddaðan mat.

## Pína

Vanligt er at ver eymur/hava pínur í hálsinum—møguliga strálandi upp móti oyrunum—fyrstu dagarnar aftaná skurðviðgerðin; verður ofta samanborið við pínu sum við ringum hálsbruna. Mælt verður tá til at taka t.d. Panodil, sum fæst í hondkeypi á Apotekinum.
Ísur kann eisini lynna væl um pínuna/eymleikan.
Aftaná skurðviðgerðina er hálsurin eitt sindur hovin. Tí kann lætta um at hava høgt undir høvdinum fyrstu næturnar.

## Fepur

Fær tú/barn títt fepur, set teg tá í samband við kommunulæknan.

## Bløðing

Umleið eina viku aftaná skurðviðgerðina dettur skónin (belegningar) av, sum situr á sárinum á hálsinum. Blóðrípur kunnu tá síggjast í spýttinum.
Um rættilig bløðing kemur frá hálsinum, far tá beinavegin á skaðastovuna ella set teg í samband við lækna.

## Áheitan

Einans brúsubað fyrstu vikuna—ikki ov heitt.
Best er at binda frið fyrstu 7-10 dagarnar, t.v.s. Ikki íðka ítrótt, lyfta ella gera nakað annað fysiskt tungt arbeiðið, tí hetta økir um vandan fyri bløðing í hálsinum.
Mælt verður av somu ársøk til, at børn ikki eru einsamøll heima fyrstu dagarnar aftaná skurðviðgerðina.



## Sjúkramelding

Verður vanliga skrivað fyri 7-10 dagar.

## Skúli/barnagarður

Kennir barnið seg væl, er eingin forðing fyri, at tað fer aftur í barnagarð/skúla, áðrenn ein vika er farin.

Vinarliga
Starvsfólkið á Oyrnadeildini

Landssjúkrahúsið